**9. a flokkur**
**Eysturskúlin**
**Tórshavn**

Ungdómstingið

**Ungdómstingmál nr. 7/2013: Uppskot til samtyktar um frukt og grønmeti í skúlunum**

**Uppskot**
**til**
**samtyktar**

Ungdómstingið heitir á landsstýrið um at fyrireika og leggja fram lógaruppskot um at geva næmingum møguleika at bíleggja og keypa frukt og grønmeti allar skúladagar í vikuni.

**Viðmerkingar**
Við hesum uppskoti verður heitt á landsstýrið um at geva næmingum møguleika at bíleggja og keypa frukt og grønmeti allar skúladagar í vikuni.

Vit halda, at fleiri fyrimunir eru við hesari áheitan. Tað kann virka sum eitt heilsupolitiskt átak, og samstundis forðar tað fyri, at næmingar fara av skúlans øki at leita sær inn í handlar at keypa í skúlatíðini.

Praktiskt verður tað gjørt soleiðis, at skúlin ger eina bíleggingarskipan, sum næmingar so nýta.

**Á Ungdómstingi, 10. februar 2014**

Laila Neshamar    Kristina Á. Jakobsen    Elin Kristina Christiansen

Jóhan S. Dahl    Johan Hofgaard    Heimi Edvardsson